## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# OGNARSKATT Á BRENNIEVNI

Í síðstu viku segði Aksel V. Johannesen, fíggjarmálaráðharri, seg vilja taka av ognarskattin á bilar, sum Sjúrður Skaale kallar tað í einum av sínum viðkomandi fyrispurningum til landsstýrismannin. Rætt hevur Sjúrður Skaale í tí, at sokallaði vegskatturin einki annað er enn ognarskattur á tey, sum eiga bilar, og rætt hevur Aksel V. Johannesen í tí, at rættari hevði verið at tikið av hendan ognarskattin og lagt gjaldið oman á brennievnið. Tá verða tað tey, sum brúka og slíta vegirnar, sum gjalda, sum landsstýrismaðurin so væl sigur. Og hvat er meira náttúrligt, enn tað?

Sjúrður Skaale førir fram, at tað er sera ymist, hvussu nógv rindast skal fyri vektgjald, alt eftir støðd, slag av bili, og, ikki minst, hvat fyri slag av brennievni, ið nýtt verður.

Her kann so leggjast afturat, at meðan Javnaðarflokkurin hevur sitið við valdið, hevur landsstýrið sjey- ella áttafaldað »ognarskattin« á viðfestisvognar - sum als ikki nýta brennievni - tí »gjaldið var alt ov lágt«, vildu tey vera við. Harvið hevur Javnaðarflokkurin so staðfest, at hann gongur inn fyri høgum ognarskatti á bæði bilar og viðfestisvognar, sum valla slíta nógvar vegir.

Men soleiðis er tað so mangan. Eitt gjald verður ásett til tess at fíggja eitt ávíst virksemi, og so verður skrúvan uttan enda brúkt, til vit brádliga sita við einum stórum gjaldi, sum ikki er annað enn ognarskattur.

Miðskeiðis í áttatiárunum var neyðugt hjá Løgtinginum at samtykkja nakrar inntøkurlógir, tí pengar vantaðu í landskassanum. Tá varð eitt oljuavgjald uppfunnið. Hetta skuldi bara vera fyribils – og tað var so rættvíst, tí øll skuldu gjalda tað sama, 75 oyru fyri liturin í eina tíð, men gakk. Gjaldið stendur við enn – og nú hava okkara politikarar umdoypt tað til eitt »umhvørvisgjald«, hóast endamálið bara var at útvega landskassanum fleiri pengar.

Men hetta er gongdin í føroyskum politikki. Sjáldan er talan um gjøgnumhugsaðar loysnir – ella breiðar semjur millum flokkar, at »soleiðis vilja vit gera«. Heldur verða nakrar ad hoc loysnir funnar, og so verður bara hildið fast við tær – og skrúvan uttan enda misbrúkt.

Viðvíkjandi vegskattinum, so kundi hann bara verið avtikin. Eingin orsøk er til at hava ognarskatt, tá vit ikki vilja hava ognarskatt, tá Løgtingið heldur ikki torir at kalla tað ognarskatt, og tá skipanin sambært landsstýrismanninum er alt ov dýr. Nú kundu politikarar gjørt sum við oljuavgjaldinum á sinni, álagt eitt umhvørvisgjald ella ein umhvørvisskatt á bensin og diesel. Soleiðis var tað tann, sum brúkti, sum betalti - eisini útlendingar!

So her er eitt upplagt mál hjá Aksel V. Johannesen at broyta. Akstovan sleppur undan miklum stríði, og brúkarin sleppur undan ognarskatti. Tann, sum brúkar vegirnar, rindar, og tann, sum brúkar vegirnar meira - ella slítur teir meira við tyngri akførum, rindar uppaftur meira. Og landskassin fær tað sama inn.

**»» Skrúvan uttan enda verður alt ov ofta misbrúk**

# Fínt skal tað vera!

Uppgávurnar hjá einum kommununuskrivara eru nú so mikið stórar og fjølbroyttar, at mett verður ikki, at heitið kommunuskrivari er eitt nóg sigandi starvsheitið longur. Hereftir skulu teir verða kommunustjórar.

Í hesum sambandi broyta fleiri kommunur í hesum døgum starvsheitið hjá kommunuskrivarunum, so at teir hereftir verða nevndir kommunustjórar. Tað sama gjørdi Tvøroyrar Býráð á fundi týskvøldið.

Annars varð upplýst á fundinum, at hóast starvsheitið nú verður kommunustjóri, eru løn og setanarviðurskiftini annars, púra óbroytt.

Í einum løttum tóna var eisini staðiliga víst á, at hetta var ikki nakað, sum skrivarin hjá Tvøroyrar Kommunu hevði funnið uppá, tí hetta var komið úr erva, sum tikið varð til.

# Prinsessan verður einslig

Í Bretlandi verður nógv gjørt burtur úr kongaliga brúdleypinum, sum er fyri framman. William prinsur skal giftast við Kate Middleton.

Kongaligir serfrøðingar í Bretlandi rokna við, at Kate kann blíva ein sera væl umtókt prinsessa. Hon kemur úr einum lítlum bý, er uppvaksin í eini miðalklassafamilju og hevur tvey systkin.

Men Kate skal eisini gjalda ein høgan prís fyri at liva sum prinsessa. Hon fer at verða einsom og kann bert hava heilt fáar vinir, sum hon kann líta á.

- Hon fer inn í ein heim, har hon ikki kann líta á fólk, tí øll kunnu finna upp á at selja søgur um hana, sigur Jennie Bond, serfrøðingur í bretska kongshúsinum.

Roknað verður við, at Kate fer at hava systur sín tætt at sær.

Kate verður eisini støðugt samanlíkna við Diana prinsessu, sum var populerasti persónur í bretska kongshúsinum í síni tíð.





**»» Miðnámsskúlin meir fjølbroyttur?**

BERGTÓRA HØGNDÓTTIR
KJAK Á SÍÐU 9



**»» Vit runnu ikki undan ábyrgd**

JACOB VESTERGAARD
KJAK Á SÍÐU 28



*Mynd: Hans Ravnsfjall*

# Bláur gullsmiður á vitjan

Í seinastu viku fingu Hans Ravnsfjall og tey vitjan av einum bláum gullsmiði í nýbygdu húsum teirra í Ovaru Sørpum í Sandavági. Sjáldsami gesturin kom inn við klæðunum, sum tikin vóru av snorinum.

Summarfuglurin var umleið átta sentimetrar úr høvdu í haga.

Mikudagin lendi sama slag summarfuglur umborð á bátinum hjá Lúkku og Børn Paturssin, tá ið tey vóru á veg úr Koltri til Kirkjubøar, skrivar faroenature.net

Hetta slagið av gullsmiði stavar upprunaliga úr Afrika og Asia og er kent fyri at ferðast til londini í Suður- og millumeuropa. Hann er funnin ynglandi so langt norðaliga sum í Danmark.

*randi@sosialurin.fo*

**Sosialurin**
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo